Dimmalætting

7 kr.

NR. 35 HÓSDAGUR 25. MARS 1993. 116. ÁRGANGUR

P/f TROL- og SNØRISVIRKIÐ
Tlf. 55254 - 56054
700 Klaksvík
Vit spinna øll sløg av línum og tøffum til fiskivinnuna

FLOGFERÐASEÐLAR
Faroe Travel
Tlf. 12600

FLOGFRAKT
Faroe Cargo
Tlf. 18787

Árni Olafsson, serkønur í føroyskum viðurskiftum í uttanríkisráðnum, hevur fingið farloyvi at røkja føroysk áhugamál í marknasamráðingunum við bretar

Føroyingar leiða miðlinju-samráðingarnar við bretar

Árni Olafsson, serkønur í føroyskum viðurskiftum í uttanríkisráðnum, loysir Tyge Lehmann av sum samráðingarleiðari

■ Føroya Landsstýri tekur við leiðsluni av samráðingunum um landgrunsmarkið millum Føroyar og Stórabretland. Hetta er greitt eftir fundin í farnu viku millum landsstýrið og uttanríkisráðið um marknaviðurskiftini Føroya og Bretlands ámillum.

Eftir at avtala varð gjørd tann 22. desember 1992 millum donsku stjórnina og landsstýrið um, at málsøkið ræsni í undirgrundini varð yvirtikið sum føroyskt sermál, eru stjórnin og landsstýrið vorðin samd um, at bestu ráðini eru, at leiðslan av samráðingunum um landgrunsmarkið millum Føroyar og Stórabretland verður hjá landsstýrinum við vanligum stuðuli frá uttanríkisráðnum.

Eitt tílíkt arbeiðsbýti er júst fyriskipað í grein 8 í heimastýrislógini: *Um føroyska heimastýrið skuldi sett fram ynski um tað, verður eftir samráð við landsstýrið settur í uttanríkisráðharradeildini ein í føroyskum viðurskiftum serkønur maður til at vera ráðharra til hjálpar við viðgerð av serligum ummæligum áhugamálum Føroya. (...) Eftir samráð við føroyska heimastýrið verður í teimum einstøku førunum givið heimastýrinum høvi til at røkja Føroya serliga áhugamál við tingingum við útheimin um handils- og fiskivinnusemjur.*

Árni Olafsson, serkønur í føroyskum viðurskiftum í uttanríkisráðnum, er at nevndur til samráðingarleiðara. Hann hevur farloyvi frá uttanríkisráðnum í samráðingarskeiðnum og er settur av Føroya Landsstýri, meðan hann røkir hesa uppgávu.

Samráðingarúrslitið verður á vanligan hátt staðfest av drottningini, eftir at fólkatingið hevur samtykt tað samsvart grein 19 í grundlógini.

pol

Munurin millum Hetland og Føroyar

Føroyingar hava sjálvir avgerðarrættin yvir havbotninum

Hóast bretar eiga oljuøkini, hevur oljuvinnan verið góð fyri hetlendingar, nú bjóða teir føroyingum tænastur, útbúnað o.s.fr. í sambandi við ein møguligan oljuídnað í framtíðini

– Vit eru ikki komnir til Føroya at siga tykkum hvussu tit skulu gera í sambandi við oljuvinnu tykkara í framtíðini. Vit eru komnir at bjóða tykkum okkara vitan og royndir, sum hava gjørt seinastu 25 árini, siga teir báðir Allan Wishart, stjóri í hetlandska oljubólkinum og Peter Malcolmsen, fyrisitingarleiðari, sum vitja í Føroyum í hesum døgum.

Vit spurdu teir báðar, hvør orsøkin er, at teir hava valt at koma til Føroya júst nú.

Teir siga, at á ein hátt er tað tilvildarligt. Tíðin passaði væl í ætlaninar hjá teimum. Bretski konsulin í Føroyum Johan Mortensen hevur hjálpt teimum nógv við at leggja ferðina til rættis og fáa samband við tey fólkini, teir vóru áhugaðir í at tosa við.

Teir báðir leggja dent á, at teir einki hava við oljufelagið BP at gera, men sjálvandi hevur tað eisini ávirkan, at Føroyar hava verið nógv frammi í Bretlandi í sambandi við stóru oljuøkini, sum eru funnin vestan fyri Hetland, siga teir báðir.

Føroyingar verða nógv umrøddir í Bretlandi í sambandi við stóru oljuøkini, sum eru funnin vestanfyri Hetland. Hetta er ein av orsøkunum til, at teir báðir oljuvinnulívsmenninir Peter Malcolm og Allan Wishart úr Hetlandi, bjóða føroyingum burtur av teirra vitan og royndum gjøgnum 25 ár í oljuvinnuni. *Mynd: Diml./Thomas*

Oljan góð fyri hetlendingar

Oljan hevur verið góð fyri hetlendingar, og teir hava sum sagt nógvar royndir í oljuvinnuni.

Ein stórur partur av hetlendingunum arbeiða í sambandi við oljuvinnuna. Havnin í Lerwick er nógv útbygd. Teir hava bygt væl útgjørdar flogahavnir. Størsti oljuterminalurin í Europa liggur í Sullom Voe o.s.fr.

Teir vísa á, at hetlendingar og føroyingar eru brøðurfólk og líkjast á nógvar mátar, teir ivast ikki í at føroyingar eisini kunnu fáa nyttu burturúr oljuroyndunum hjá teimum.

Allan Wishart og Peter Malcolmsen hava einki við nakað oljufelag at gera, men umboða ein hetlendskan bólk av 40 ymiskum feløgum og 1500 arbeiðsfólkum, sum hava við oljuvinnuna at gera á ymiskan hátt.

Hetlendsku feløgini tóku seg saman seinast í 80'árunum í henda bólkin at samskipa alt arbeiðið í Hetlandi, sum hevði samband við oljuvinnuna.

Ymisk to lík

Hetlendingar vóna at møguleiki nú verður at menna samstarvið við føroyingar, møguliga gera jointventure avtalur o.s.fr.

Ymiskleikar eru millum Føroyar og Hetland. Meðan arbeiðsloysið í Føroyum er uppi á 25%, er einki arbeiðsloysi í Hetlandi. Men vegakervið í Føroyum er betri enn í Hetlandi.

Tó størsta fyrimunin hjá føroyingum halda teir báðir vera, at føroyingar sjálvir eiga havbotnin og harvið eisini møguligu oljuøkini. Tað merkir, at føroyingar hava sjálvir avgerðarrættin, tað hevur ógvuliga stóran týdning.

Hetlendingar eiga eingi oljuøki, tað gera bretar. Teir halda, at tað sjálvandi hevði verið betri, um teir sjálvir høvdu avgerðarrættin yvir teimum. Tó hava teir royndt at fingið tað besta burturúr samarbeiðnum við bretar. Teir hava góð viðurskifti við Bretland, og hetta hevur verið til fyrimuns fyri báðar partar, siga Allan Wishart og Peter Malcolmsen.

Óvissan

Vit spyrja hetlendsku umboðini, um teir halda, at føroyingar hava nakran møguleika soleiðis, sum umstøðurnar eru í landinum, at gera íløgur ella at fáa ein oljuídnað upp á føtur.

Teir siga, at tað altíð er ein vági at fara í holt við ein ídnað.

– Føroyar eru niðri í einum aldudali nú, men soleiðis er tað í øllum samfeløgum, at tað gongur upp og niður eisini í Hetlandi. Trupulleikin er heldur, at alt er so óvíst. Og eingin kann siga nakað um, nær nakað fæst burturúr oljuni. Tað tekur nógv ár, frá oljan er funnin til fíggjarligu fyrimunirnir fáast av henni.

Álit á føroyingum

Allan Wishart og Peter Malcolmsen ivast ikki í, at føroyingar fara at fáa eina oljuvinnu upp á føtur hóast ringu tíðirnar.

– Tað hevur víst seg í gjøgnum tíðirnar, at nógvir dugnaligir føroyingar eru, og teir fara ivaleyst eisini at klára at skipa fyri eini oljuvinnu.

Um samstarvið við hetlendingar verður til nakað, valdast tó, um seismisku kanningarnar fara at geva nøkur úrslit. Hvussu oljuprísirnir í framtíðini verða. Hvussu kostnaðarstøðið verður o.s.fr.

Allan Wishart og Peter Malcolmson hava tosað við Marita Petersen, løgmann og Tummas Arabo, landsstýrismann í ídnaðarmálum. Eisini vórðu umboð úr føroyska vinnulívinum bjóðað til fundar. Í gjár vóru teir í Suðuroynni og hugdu eftir viðurskiftunum har. Teir fara heimaftur í dag.

sk

Sjálvskaptur trupulleiki

FYRI fáum árum síðani var av føroyskum ávum Danmark biðið um, at Føroya sjógvur kundi koma undir føroyskt ræði, og hetta ynski gekk danska stýrið við til. Av summum føroyingum var hetta tikið sum eitt satt bragd, meðan sjálvt summi av teimum okkara, sum her ráða, hildu, at Danmark bara gekk við til føroyska ynskið fyri at sleppa undan møguligum trupulleikum í hesum máli seinni.

Tað er ikki lætt hjá Danmark at gera Føroyum ein beina nú og tá, tá ið vit av og á krevja serrættindi, tí gevur Danmark ikki eftir ynskjum okkara, so øsast vit upp, men geva teir eftir, so verða teir skuldsettir fyri at sleppa sær undan ábyrgdum viðvíkjandi Føroyum.

Nú meðan málið er frammi um rættindi Føroya at royna at bjarga sær vinning av olju í havbotni Føroya, tekur spurningurin seg upp um, hvør ið skal føra samráðingar við aðrar tjóðir um hesi rættindi. Hvør okkara, danir ella føroyingar, skulu samráðast um markið mótvegis øðrum landi, har mark er ímillum okkum og teir.

Eftir sum tað nú, eftir ynskjum okkara, eru vit í Føroyum, sum hava fingið rættindini til egnan sjógv, so eiga tað at vera vit í Føroyum, sum skulu samráðast um markið sjóvegis ímillum okkum og sjógrannar okkara. Men her tykist nú at ráða ivi um, hvørjir skulu samráðast okkara vegna við sjógrannarnar, vit ella danir. Átti tað at verið nakar spurningur?

Av tí, at danir eftir ynski okkara hava unt okkum rættindini yvir havi okkara, herundir tað sum finst í sjóbotninum, so eiga tað at vera vit, sum skulu samráðast um havsmarkið við onnur lond og herundir bera útreiðslurnar av kanningum av botnviðurskiftunum viðvíkjandi oljuvinnuni.

At tað neyvan kemur at vera ókeypis at kanna, um olja er at finna í havsbotni okkara, er trúligt, tí Føroyar eru vorðnar til av vulkanskum atvøldum, og botnurin er skaptur av rættiliga tjúkkum blágrýti, so her vera óvanliga dýrar viðgerðir neyðugar, skulu oljukeldur kunna opnast og vera kappingarførar við annað vunnið botnvirði.

Vilja danir vera við til at fíggja slíkar ikki óbilligar oljukanningar undir Føroyum, sum vit sjálvir ikki makta, so er tað teirra egna søk; tí teir vita sjálvir, at teir hava slept sínum rættindum til at fáa nakað burturúr, av tí at teir eftir føroyinga ynski ikki eiga part í møguligum ríkidømi í havsbotninum undir Føroyum longur.

Túrarnir hjá Atlantsflog verða enn færri komandi tíðina, tí sambært samráðingunum við Maersk, skulu bæði feløgini skerja túratalið við 10-15%. Í dag hava feløgini 800 fráferðir, og skal hetta tal niður á 700 *Mynd: Diml./Dia*

Flogsambandið Føroyar-Danmark:

Maersk og Atlantic eitt ára samstarv

– Hvørki vit sum privatfelag ella Atlantic Airways sum alment felag hava ráð at flúgva við tómum setrum, sigur Bjarne Hansen, stjóri í Maersk Air

Atlantic Airways er í stórum fíggarligum trupulleikum. Higartil hevur felagið á føroyarutuni kappast við Maersk Air.

Fyri tíð síðani settust flogfeløgini við samráðingarborðið, og í dag eru partarnir komnir ásamt at gera nakrar broytingar í flogsambandinum millum Føroyar og Danmark.

Í skrivinum frá báðum feløgunum verður millum annað sagt, at túratalið hjá feløgunum verður lagt eftir tørvinum í árinum. Vit hava spurt stjóran í Maersk Air, Bjarne Hansen, um hetta ikki er nakað, ið altíð verður gjørt.

– Jú, tað er rætt nokk, men trupulleikin hevur verið, at bæði feløgini tilsamans hava havt ov nógv tóm pláss á rutuni til og úr Føroyum í mun til ferðafólkatalið. Havandi í huga fíggjarligu trupulleikarnar í Føroym, so verða tað neyvan fleiri í fara at ferðast komandi tíðina, so tí hava vit verið noydd at síggja veruleikan í eyguni, sigur Bjarne Hansen.

– Hvørki vit sum privatfelag ella Atlantic Airways sum alment felag, hava ráð at flúgva við tómum setrum, tí tá alt kemur til alt, endar rokningin hjá onkrum, ið skal gjalda hana. Tí eru vit farnir í samstarv við Atlantic Airways um flogsambandið millum Føroyar og Damark.

Avsannar leysatíðindi

Nógv tøkiligt kann ikki sigast vera í skrivinum frá feløgunum, hóast samráðingar hava verið í longri tíð. Men sagt verður tó, at føroyski flúgvarin um morgunin, fer avstað fyrr á morgni, so ferðafólk hava betri møguleika at flúgva víðari úr Keypmannahavn. Í staðin fyri kl. 11.30 verður flogið kl. 10.45 úr Føroyum.

Nógvar eru søgurnar ið ganga, og millum annað hevur verið at hoyrt, at Maersk Air skal yvirtaka Atlantic Airways, men stjórin avsannar hetta.

– Tað kann eg beinanvegin avsanna. Á teimum fundum eg havi verið, er hetta ongantíð komið uppá tal, sigur Bjarne Hansen.

Kortini veit stjórin í Maersk Air einsog flest allir føroyingar, at Atlantic Airways hevur stórar fíggjarligar trupulleikar, men sum hann tekur til:

– Vit berjast øll við fíggjarligar trupulleikar, og tað er ongastaðni í verðini, at flogvirksemi gongur væl. Og tí er at fegnast um, at báðir partar á hesi rutuni hava sæð veruleikan í eyguni, sigur stjórin í Maersk Air.

Avtalan millum Maersk og Atlantic fær gildi eftir páskir.

– Avtalan millum okkum og Atlantic er bindandi eitt ár fram. Tá ein tíð er liðin setast vit aftur við borðið og finna útav, hvat skal gerast, sigur Bjarne Hansen, stjóri í Maersk Air, við Dimmalætting.

Spurningurin er so, um Atlantic Airways klárar eitt heilt ár aftrat ella tað verður Maersk, ið situr báðumegin borðið á næsta samráðingarfundi.

D